UTTAN ÚR HEIMI

Lekur framvegis

Sponsku myndugleikarnir siga, at 125 tons av olju renna úr tangunum á tangaskipinum "Prestige", sum sakk einar 120 fjórðingar úr sponsku útnyrðingsstrondini tann 19. november. Umleið 60.000 tons vóru í skipinum, tá tað sakk. Onnur 17.000 tons eru riknin inn á land og hava havt umfatandi dálking við sær.

Bjargingarfólk og fiskimenn hava funnist hvassliga at myndugleikunum í Madrid, sum verða lagdir undir at hava undirmett vanlukkuna, og fyrrakvøldið mátti Jose Maria Aznar, forsætisráðharri viðganga í sjónvarpinum, at mistøk hava verið. Samstundis varð upplýst, at myndir hjá einum fronskum kavbáti vísa, at 15 hol eru á skrokkinum á "Prestige", og at olja rennur úr fleiri teirra.

Sponsku myndugleikarnir høvdu vónað, at oljan fór at storkna í tangunum orsakað av tí stóra trýstinum niðri á 1900 favna dýpi, men hetta tykist ikki vera so, og tí stúra fiskimenninir í Galicia fyri, at teirra vinna fer at liggja lamin mong ár fram í tíðina.

Samstundis eru Spania, Portugal, Frakland og Bretland farin at keglast um, hvussu rætt tað var at toga tangaskipið út frá landi. Tað vóru spaniumenn, sum gjørdu av at toga skipið til havs, áðrenn tað sakk.

Forðar neyvan kríggi

Serfrøðingar vænta ikki, at vápnafrágreiðingin, sum irakar hava latið ST, fer at fáa amerikanarar at sleppa ætlanini at leypa á Irak og at reka Saddam Hussein frá.

Magnus Ranstorp, sum starvast á granskingarstovninum St. Andrew í Skotlandi, sigur, at tað slepst ikki undan kríggi. Hann sigur, at tann rúgvusmikla irakska frágreiðingin er ein roynd at draga tíðina út, men at hon forðar ikki álopsætlanini.

Tíðindastovan Reuters hevur spurt 18 granskarar, hvussu teir meta útlitini. Tíggju svaraðu, at teir vænta amerikanskt álop á Irak. Hinir átta siga, at møguleikin fyri friði er líka stórur sum møguleikin fyri kríggi.

Hótta við verkfalli

Starvsfólk í felagnum BAA, sum rekur sjey av teimum stóru floghavnunum í Bretlandi, hótta nú við at fara í verkfall á jólum, fáa tey ikki ta lønarhækking, sum tey hava biðið um.

BAA rekur millum annað tær báðar stóru floghavnirnar við London, Heathrow og Gatwick, og eitt verkfall kann tí fáa sera stórar avleiðingar fyri bretska sambandið við umheimin.

Leiðslan í BAA og umboð fyri fakfeløgini hjá starvsfólkunum hava játtað at gera eina roynd afturat at finna eina semju um lønarspurningin. BAA hevur boðið starvsfólkunum sjey prosent lønarhækking í einum tvey ára skeiði, men tað tilboðið vilja starvsfólkini ikki góðtaka.

Hótti við bumbu

Ein 16 ára gamal drongur í einum býi í Småland í Svøríki skilti einki, tá løgreglan brádliga kom og tók hann nú ein dagin.

Á løgreglustøðini fekk drongurin at vita, at at tað var amerikanska samveldisløgreglan FBI, sum hevði givið boðini um at taka hann. FBI segði seg hava fingið eitt teldubræv frá dronginum, har hann hótti við at spreingja eina bumbu í einari floghavn í Los Angeles. Tann 16 ára gamli drongurin játtaði, at hann hevði sent teldubrævið.

Løgreglan í Jønkøping sigur, at drongurin hevði ikki givið sær far um, hvussu álvarssamt teldubrævið var, og tí dugir løgreglan heldur ikki at siga, um hann verður revsaður.

Nú skulu tíggju lond fáa limaskap í ES

ES-formaðurin Anders Fogh Rasmussen væntar, at øll tey tíggju umsøkjaralondini fara at góðtaka treytirnar fyri limaskapi á toppfundinum í Keypmannahavn

ES-VÍÐKAN
Árni Joensen

Anders Fogh Rasmussen leggur stóran dent á at fáa tey tíggju umsøkjaralondini upp í ES á toppfundinum í Keypmannahavn, men hann er ímóti at geva Turkalandi ein samráðingardag
Mynd: Reuters

Seinastu dagarnar hava diplomatarnir hjá danska uttanríkisráðnum við Per Stig Møller, uttanríkisráðharra á odda arbeitt undir stórum trýsti fyri at fáa umsøkjaralondini at góðtaka tað seinasta tilboðið, sum londini fingu fyri átta døgum síðani. Alt skal fáast upp á pláss til toppfundin millum ríkis- og stjórnarleiðararnar í Keypmannahavn.

Í gjár høvdu trý av teimum tíggju umsøkjaralondunum formliga góðkent tilboðið, men keldur í Keypmannahavn søgdu, at fimm onnur lond høvdu givið til kennar, at tey fara eisini at góðtaka tilboðið. Eftir stóðu Malta og Póland, sum bæði hava lagt nýggj krøv á borðið seinastu dagarnar.

Serliga Póland er komið við nýggjum krøvum. Krøvini snúgva seg í veruleikanum um meiri pengar, men Anders Fogh Rasmussen segði týskvøldið, at mappan er koyrd í lumman, og hon verður ikki tikin úr lummanum aftur, sum hann orðaði tað. Formaðurin í ES-nevndini, Romano Prodi, hevur harafturímóti mælt ES til at lata umsøkjaralondunum meiri pengar, men danski forsætisráðharrin sigur, at hann hevur ikki heimild til at lata meiri enn tað, sum hann hevur latið londunum.

Tað er tó vert at hava í huga, at ES hevur umleið 15 milliardir krónur eftir av játtanini til umsøkjaralondini, og eygleiðarar siga, at tað kann væl henda, at ríkis- og stjórnarleiðararnir á toppfundinum í Keypmannahavn fara at játta Pólandi ein part av hesum pengunum fyri at fáa landið uppí. Víst verður á, at Póland er nógv tað størsta av umsøkjaralondunum, og at tað fer at koma ES illa við, fer Póland at standa uttan fyri, tá saman um kemur.

Turkaland

Ein annar spurningur, sum stórur spenningur er um undan toppfundinum, er Turkaland. Stjórnin í Ankara leggur stórt trýst á ES fyri at fáa settan ein dag fyri, nær samráðingarnar um turkiskan limaskap kunnu byrja, men higartil hevur danski forsætisráðharrin víst hesum aftur. Tað gjørdi hann eisini, tá formaðurin í islamska stjórnarflokkinum í Turkalandi var á vitjan í Keypmannahavn fyrr í vikuni.

Nú er USA komið upp í málið, og fyrradagin segði George W. Bush, at USA fer at gera sítt til at fáa ES at áseta ein samráðingardag. Sambært Bush hevur hetta týdning fyri USA, men eisini fyri Evropa. Týskland og Frakland hava eisini sagt, at tey eru fyri at áseta ein dag fyri samráðingum um turkiskan limaskap.

Norðmenn siga ja til ES

Áhugin fyri ES-limaskapi er vaksin nógv í Noregi seinastu mánaðarnar

NOREG OG ES
Árni Joensen

Ein nýggj meiningakanning í Noregi vísir, at alt fleiri norðmenn eru fyri at fara upp í ES. Kanningin sigur, at 44 prosent av teimum, sum hava tikið støðu til spurningin, høvdu atkvøtt fyri limaskapi, var fólkaatkvøða nú. 37 prosent siga, at tey høvdu atkvøtt ímóti.

Samanborið við eina tilsvarandi kanning, sum varð gjørd í september, er broytingin stór. Tá svaraðu 36 prosent, at tey høvdu atkvøtt fyri ES-limaskapi, meðan 45 prosent søgdu, at tey høvdu atkvøtt nei. Nú er myndin at kalla tann beint øvugta.

Men aðrar kanningar hava seinastu tíðina bent á tað sama borðið. Allar hava víst, at tey, sum eru fyri limaskapi, gerast alt fleiri og fleiri í tali. Tann greiðasti munurin kom fram í einari kanning, sum Aftenposten gjørdi í síðsta mánað. Har svaraðu 58 prosent, at tey vóru fyri limaskapi í ES, meðan 42 prosent søgdu seg vera ímóti.

Norskir politikarar eru sum altíð varnir við at gera viðmerkingar til kanningarnar, men formaðurin í Framburðsflokkinum, Carl I. Hagen, segði í síðstu viku, at spurningurin um ES-limaskap verður ein av høvuðsspurningunum í valstríðnum til næsta stórtingsvalið. Og hetta fer flokkurin at fyrireika seg til nú, segði hann. Veljarakanningar hava leingi víst, at Framburðsflokkurin hevði verið landsins størsti, var val nú.